

*Tað verður nokk av øli til øll á ólavsøku, hóast sølan er minkað nakað í mun til í fjør.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Sølan av rúsdrekka minkar

**Áhugin fyri at keypa rúsdrekka til ólavsøkuna er minkaður í ár í mun til í fjør hjá Rúsdrekkasølu landsins. Bryggjaríini lata tó væl at koma á hædd við hana í fjør.**

RÚSDREKKA
*Heri á Rógvi*

Tað kemst ikki uttanum, at nógv verður drukkið av tí sterkara slagnum um ólavsøkuna. Eins og jólini merkir ólavsøkan metsølu hjá bryggjaríunum og Rúsdrekkasøluni. Men okkurt er, sum kundi bent á, at sølan av rúsdrekka er minkandi í Føroyum.

Búskaparráðið vísti fyrr í vikuni á, at framgondin í føroyska búskapinum fór at minka nakað næstu árini, og tað tykist sum um, at tað sama er galdandi fyri rúsdrekkasøluna her á landi.

Dagmar Joensen, stjóri fyri Rúsdrekkasølu landsins, sigur, at tey hava selt nakað minni enn í fjør.

— Seinnu árini er sølan voksin á hvørjum ári, men nú tykist hon at minka aftur, sigur Dagmar Joensen.

Hon sigur seg ikki duga at meta um, hvør orsøkin er, men fyri alt árið tykist sølan at gerast nakað slakari enn í fjør. Tá vit ringdu til sølustøðini fríggjamorgunin væntaðu øll, at nógv søla fór fram restina av fríggjadegnum. Dagmar Joensen sigur, at tey skulu selja óvanliga nógv, um sølan skal koma á hædd við hana í fjør.

Hjá Rúsdrekkasøluni hevur tað víst seg, at blandaðu drykkirnir í fløskum eru ógvuliga væl umtóktir, og útselt var longu hósdagin og tíðliga fríggjadagin.

## Nógv øl

Bryggjaríini, sum standa fyri einum stórum parti av vanligari søluni, lata í mun til Rúsdrekkasøluna væl at.

Hjá Føroya Bjór avgreiðsluni siga tey, at sølan av øli til klubbar og dansistøð er voksin í mun til í fjør. Vanliga sølan av øl er nakað tað sama sum í fjør – møguliga eitt sindur meira.

Hjá Føroya Bjór leggja kundarnir seg mest eftir øl í sokallaðum pilsnara styrki (4,6%). Sølan av sodavatni er nógv voksin eisini í mun til í fjør.

Eisini hjá kappingarneytanum Restorffs er gott lag um hesa tíðina.

Teir siga seg hava tvífaldað samlaðu søluna í mun til í fjør. Òla Svenn Nolsøe, stjóri, sigur, at teir hava bryggjað tað sama til ólavsøkuna hesa vikuna, sum teir vanliga bryggjað ein heilan mánað.

Hjá Restorffs eru tað tær sterkaru ølirnar (5,8%), sum eiga nógv tann størsta partin av søluni. Nýggja ølin Mungát hevur rættiliga fingið bein at ganga á, siga Hot og Nolsøe.

Alt í alt tykist tað ikki sum um, at fólk fara at ganga tyrst á ólavsøku.

# Settu hol á ólavsøkuna

**Funk, fúlt og friðarligt var á skránni, tá tónleikarar í Hoydølum góvu sítt boð upp á eina ólavsøkukonsert**

KONSERT
*Heri á Rógvi*
*Myndir: Finnur Justinussen*

Um ólavsøkutíð plaga fólk at skipa fyri konsertum. Ólavsøkukonsertin eigur í sínum egni rætti ein serstatus, men tað eru eisini aðrar, sum troðka seg framat. Hóskvøldið vóru Hoydalur karmur um eina konsert, sum er sett á skránni sum ein lítil byrjan til ólavsøkuna. Tað er altíð áhugavert, tá fólk taka stig til at halda tílíkar konsertir. Í løtuni tykist Havnin at anga av live-tónleiki, tí á hvørjari café ella barr standa tónleikarar og spæla.

Hetta umtalaða hóskvøldið kláraði í besta føri at savna tað, vit vilja kalla fyri, fitt av fólki.

Rammurnar rundan um konsertina vóru sum heild góðar, og fyrireikararnir royndu at skapa ein serligan "stemning", og framførslurnar vóru eisini ráðar við teimum feilum og øðrum, sum kunnu koma fyri. Tað skein tó alt ov nógv ígjøgnum, at ein ljóðprøvi ella venjing manglaði, tí allatíðina skuldi skrúvast upp og niður. Fyri 50 kr. so vilt tú helst sleppa undan hesum.

Fyrstu á pallin var ein bólkur kallaður Páll Finnur Páll. Teir, jú tú gitti tað, eita Páll, Finnur, Páll og Høgni og hóskvøldið eisini ein Páll afturat og ein Ìsak.

Teirra tónleik kann mann væl kalla hampuliga originalan. Ljóðið minnir mest um modernaðar enskar bólkar við kassagittara í sentrum. Teir eru við á teirri nýggju fløguni hjá FUT, sum júst er komin út.

Í fyrstu atløgu kanst tú fáa kensluna av, at teir syngja penar kærleikssangir, men við eitt gerst alt meira undarlig og serstøk. Teksturin snúgva seg um blottarar, ølstovur, sex og tað sum verri er. Tekstir og løg eiga teir sjálvir.

Ósmædnir, men vit einari ógvuliga trilvandi pallframførslu, góvu teir eina heldur øðrvísi mynd av, hvat ber til at syngja um. Tað verður tó alt sungið í einum løttum og skemtandi tóna. Serliga eitt yndisligt lag hjá bólkinum, sum veruliga vísir á dygdir, gerst til eina søgu um ein misnýttan drong, sum... nei, so siga vit ikki meira.

## Svart/hvítt

Frá heimagjørdum fúlum gekk leiðin víðari til bólkin Gruv. Hóast pallurin nú taldi átta hvítt andlit, so verður tónleikurin fyri tað nógva kolasvartur. Tað var funk, soul, R n'B v.m. Motown klassikarar og nýggjari soul tónar vórður spældir. Hóast framførslan gjørdist nakað nógv poppkend, so virkaði tann reina spæli - gleðin í tónunum kveikjandi fyri áhoyrarafjøldina.

Forsangari í bólkinum er Christina Elisbeth Mørkøre, sum ikki helt seg aftur við at taka fatur í Aretha Franklin og øðrum souldamum.

Serliga løgini hjá Brand New Heavies tóktust at rigga væl hjá bólkinum, sum er mannað av nøkrum rættiliga dugnaligum tónleikarunum.

## Friðarligt

Síðsta bólkurin á skránni var Déja Vu, sum skulu vera við á ólavsøku konsertini, og hetta gav teimum heitið sum høvuðsbólkur á konsertini.

Teirra tónleikurin var ógvuliga friðarligur og inniligur. Tað tóktist at hava trupulleikar av tekniskum slag, men teirra ljóð minti mest um enskar bólkar sum Travis og aðrar, ið teir eisini spældu løg hjá. Teir søgdu seg vanliga vera meira lívligar, men tað mann kortini ikki bila so nógv, tí tað riggaði, og serliga gittarleikarin við góðu røddini tóktist væl upplagdur.

Tað tykist tó rættiliga undarligt, at ein friðarligur bólkur skal enda eina konsert eftir tveir lívligar bólkar, og hetta tóktist eisini at trotta fólk nakað.



*Christina Elisabeth Mørkøre stóð á odda fyri einum vælupplagdum gruvi*



*Mær dámar menn – tað leggi eg einki í. Mær dámar at stinga hann... , syngja Páll Finnur Páll*







B R Ú K T I R B I L A R


**MAZDA DEMIO**
Árg feb.99, Km 54.000. sum nýggjur, eykadekk fylgja við. Kr. 96.000.


**SUBARU LAGACY 2.0 GL**
Árg des.93, Km 225.000. Kr. 65.000.


**FORD FIESTA 1.8 D**
Árg jan.96, Km 134.000. Kr. 64.000.


**RENAULT MEGANE 1.4 H/B**
Árg jul.97, Km 74.000. Kr. 89.000.


**SAAB 9-3 2.2TD**
Árg okt.99, Km einans 33.000. Kr. 196.000.


**FORD MONDEO 1.8**
Árg mai.96, Km 62.000. senkaður viðsportfelgum. Kr. 98.000.


**PEUGEOT 306 1.9 D**
Árg nov.95, Km 122.000. við alufelgum. Kr. 74.000.


**FORD ESCORT 1.6 16V**
Árg des.95, Km 57.000. í sera góðumstandi. Kr. 72.000.


**PEUGEOT 106**
Árg apr.96, Km 77.000. Kr. 69.000.


**VW PASSAT TDI**
Árg aug.99, Km 77.000. Turbo diesel, alufelgur, automatgear / TipTronic. Kr. 198.000.


**MAZDA 626**
Árg apr.88, Km 184.000. Kr. 26.000.


**RENAULT MEGANE 2.0 H/B**
Árg jun.96, Km 114.000. Kr. 78.000.


**VOLVO 440**
Árg des.95, Km 58.000. Kr. 89.000.


**MAZDA MPV TURBO DIESEL**
Árg des.98, Km 77.000. 7 persónabilur. Kr. 165.000.


**RENAULT MEGANE 1.6 CLASSIC**
Árg jun.2000, Km 62.000. Kr. 134.000.


**TOYOTA CARINA 2.0 GLI SEDAN**
Árg aug.98, Km 44.000. sera væl hildin. Kr. 129.000.


**SUZUKI SWIFT 1.6**
Árg jan.90, Km 139.000. Kr. 24.000.


**VW GOLF 1.8**
Árg okt.95, Km 97.000. við alufelgum, sera væl hildin. Kr. 98.000.

**Brúktbilaváttan verður latin**

B R Ú K T I R B I L A R

VOLVO
RENAULT

VR
BILAR



**Mercedes Sprinter 412D**
**Lastbilur við presending**
**árg. des. 1999**
**km. 22.000**
**prísur: kr. 220.000,- u/mvg**

**uttan bil í býti: kr. 188.000,-**

Sp/f VR-bilar · Hoyvíksvegur 61 · P.O.Box 3130 · FO-110 Tórshavn · Tel. 322110 · Fax 322111